

# Hugurin til handverkið horvin

**Hesi seinastu 12 árini hevur Sámal smíðað 60 kappróðrarbátar íalt. Hann rør nú framundir, at tað ikki verða eins nógvir bátar smíðaðir afturat í framtíðini**

BÁTASMÍÐ
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Líka síðani Sámal smíðaði fyrsta bátin, hevur hann lagt doyðin á, at arbeiðið skuldi verða væl úr hondum greitt hvørja einastu ferð.

Eftir allar hesar bátarnar er líkt til, at Sámal er við koma til eitt vegamót.

Fyri honum var sera spennandi at gera tað fyrsta 10-mannafarið. Tá hann so skuldi undir at gera eina aðra bátastødd, kundi hann ikki brúka somu modellini sum ein brúki til tann størra bátin. Tá var tað ein stór avbjóðing at síggja, um tað fór at eydnast at føra modellið yvir á eina aðra stødd.

- Jú, tað var sera spennandi at vita, hvussu tað riggaði, tá eg t.d. skuldi gera mun á einum 5-mannafari og einum 6-mannafari. Soleiðis hevur tað verið líka til nú.

- Men skal eg vera heilt erligur, so havi eg umhugsað støðuna. Ja, hugurin at smíða bátar er als ikki tann sami nú sum áður. Hann er nærum burtur, sigur Sámal álvarsamur.

### Avbjóðingin farin

Ein orsøk til hesa støðuna sigur hann vera, at hann er einsamallur í sínum starvi hvønn einasta dag og ynskir at koma út millum fólk.

Og sum hann sigur tað so rámandi: Misjónin ER eisini rokkin!

- At byrja við var hetta ein spennandi avbjóðing fyri meg, har eg kundi royna nøkur ting í verki. Men í dag er støðan hon, at eg eri so at siga komin á mál, og at hetta er bara at meta sum eitt arbeiði hjá mær.

- Tað er ikki sami spenningurin í arbeiðinum nú, sum tað var áður, sigur vælumtókti bátasmiðurin.

Sámal hevur hugsað um ymiskt. Hann hevur arbeitt nakað á einum heimi fyri fólk við breki, men enn er eingin avgerð tikin um hvat hann fer at gera.

- Eg kann altíð seinni fara at gera onkran bátin ella onkra umvælingina. Men tað verður neyvan burturav!

*Tað vísti seg at summir bátar altíð vunnu. Og so var næstan líkamikið um teir skiftu fólk ella ikki*

*Tú veitst hvussu tað er: Tað er sjáldan galið við manningini. Tað er altíð báturin sum fær skuldina fyri tey vánaligu úrslitini*



*Tað tekur Sámali Hansen 5-6 vikur at byggja ein kappróðrarbát, alt eftir stødd. Eitt 10-mannafar sum hetta kostar slakar 95.000 krónur við øllum*